# FM-kapping í Borðtennis

*FM-kappingarnar í borðtennis í ein- og tvímansleiki byrja sunnudagin 2. apríl.*

FM-kappingarnar í borðtennis í ein- og tvímansleiki fyri yngru deildirnar verða sunnudagin, 2. apríl í ítróttarhøllini á Hálsi.

Kappingarnevndin ger vart við, at avgjørt síðsta freist fyri tilmelding er týsdagin 28. mars, og eftir hetta er ikki gjørligt at melda til. Lutakast verður nevnliga týskvøldið, og tá verður kappingin eisini løgd til rættis.

Kappingarnevndin sigur víðari, at raðlistarnir frá Grand Prix-kappingunum í vetur verða nýttir at styrkismeta - seeda - leikararnar.

### Favorittarnir

Stórur spenningur verður væntandi í fleiri deildum, hvør verður føroyameistari. Tí hóast greiðir vinnarar hava verið í Grand Prix-kappingunum í nøkrum deildum, so er her talan um FM - og nógv stendur á leikarunum. Tí stórur heiður er sjálvandi í tí at gerast føroyameistari.

Tó kunnu vit nevna nøkur nøvn, sum óivað fara at gera vart við seg sunnudagin.

Hjá pinkunum hevur Rakul V.Magnussen úr Streymi vunnið allar kappingarnar í vetur, og spennandi verður so at síggja, um hon eisini megnar at vinna FM-heitið.

Eisini Brian Hansen hjá piltunum verður tungur at syfta. Hann er eisini úr Streymi.

Rókur Nielsen úr TÓR og Elisa Abrahamsen úr Streymi eru óivað favorittar hjá ávikavist Smádreingjum og Smágentum.

### Alt kann broytast

Eitt annað, sum fyrr hevur víst seg er, at yngru leikararnir ofta vinna eldri deildir eisini. Í FM-kappingini í borðtennis er tað nevnliga so, at um ein leikari gerst millum 4 teir fremstu í einmansleiki ella 2 teir fremstu í tvímansleiki, so hevur hann vunnið sær rætt at spæla við í næstu deild eldri enn hansara egnu. Og fleiri ferðir hava t.d. piltar vunnið FM-heitið í Smádreingjadeildini. Hetta má so eisini bera boð um, at skipanin er góð - og verd at varðveita.

Kappingarnevndin í Borðtennissambandinum sigur at enda, at FM fyri eldru deildirnar verður í Tórshavn leygardagin 8. apríl.



FM-kappingin hjá yngru deildunum í borðtennis stendur nú fyri framman

# Kasparov til Íslands

*Talv: Um mánaðarskiftið fer heimsins sterkasti telvari til Íslands at telva eina kvikkapping saman við øðrum sterkum telvarum. Hendan kapping er ein uppvísing til Reykjavík Open, sum millum annað Flóvin Tór Næs luttekur í*





*Sterkasti telvarin í talvsøguni, Gary Kasparov skal í næstum til Íslands at royna seg. Áðrenn hetta, hevði hann tó stundir til at royna seg í talvi móti fyrrverandi tennisstjørnuni, Boris Becker*

Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Sjáldan ferðast heimsmeistarar í talvi á okkara leiðum, og vitjan Kasparovs til Íslands minnir ikki sørt um dystin millum Bobby Fischer og Boris Spassky í 1972. Tá vaks talváhugin bæði í Íslandi og Føroyum eksplosivt og serliga íslendingar hava síðani rættiliga gjørt seg galdandi sum sterk talvtjóð.

Vitjanin hjá Kasparov staðfestir enn einafer hegnið hjá bróðurfólki okkara í norðvestri at vera við á hægsta stigi. Kasparov er í dag ein heimsstjørna, sum ferðast kring allan knøttin sum ambassadør fyri telving á hægsta stigið eins væl og innan talentmenning. Hann er sterkasti telvari í mannasøguni, og hevur sum eingin annar verið førur fyri at vakt áhuga hjá vinnulívi og mentunarstuðlum fyri telving.

Tað verða Gary Kasparov, Viswanathan Anand, Jan Timman og talvvinur okkara Ivan Sokolov, sum fara at telva eina tveir daga kvikkapping í Reykjavík.

Nógv talvtiltøk verða á skránni undan Reykjavík Open, eitt nú fer Kasparov at telva uppi á einum jøkuli. Tað er jú eyðvita kalt á toppinum.

### Becker móti Kasparov

Eitt hitt feskasta dømið fyri talentinum hjá Kasparov, at marknaðarføra telving vítt og breitt, var dysturin hjá honum móti Boris Becker á alnótini herfyri.

Becker hevur altíð havt áhuga fyri talvi, og hann slapp so sanniliga at royna seg. Hann hevur í nógv ár droymt um at telva móti Kasparov, og tá Kasparov tók av tilboði Beckers, gjørdist dysturin veruleiki. Kasparov hevur í mong ár spælt tennis í frítíð sínari, og hevur tí sjálvsagt stóra virðing fyri Becker.

Talvúrslitið hevði ongan týdning, tí ongin ivi var um úrslitið. Heimsmeistarin hugnaði sær til tíðin var við at ganga undan, og avgjørdi síðan talvið til egnan fyrimun. Eftir talvið bjóðaði Becker av í tennis, og Kasparov tók av við tí fyrivarni, at tennisstjørnan bert spældi bóltin til hansara forhond.

### Útisetar omaná

Tað er ikki bert í teimum høgu luftløgunum at tað hendir nakað í talvverðini. Talvfelagið Føroyar í Keypmannahavn hevur í ár stríðst eitt náðileyst stríð, at halda seg uppi í 3 deild.

Fleiri av teimum sterkastu talvútisetunum hava ikki verið á liðnum hetta kappingarárið, og ikki hevur gingist alt ov væl frá hond hjá restini. Til síðsta umfarið lógu føroyingarnir bert hálvtannað stig fremri enn Saxo, sum vóru argastu kappingarneytarnir sum stríddust um lívið í 3 deild. Tað vísti seg, at mennirnir úr Saxo telvaðu ein sera góðan dyst, og vunnið trygt 6,5-1,5 (telvt verður á 8 borðum).

Føroyingarnir vóru tískil kroystir upp í ein krók, og máttu berjast fyri hvørjum stigi. Endin varð, at okkara fólk vann sín dyst heili 7,5-0,5! Sostatt bjargaðu útisetarnir lívið hjá sær í 3 deild, og tað frættist at vónirnar til næsta kappingarár eru nógv bjartari — væl stuðlaðar av síðsta stóra felagshálinum.



Sum vera man, so hevði Becker ongan møguleika móti Kasparov, men teir báðir hugnaðu sær kortini óført, og eftir dystin fekk týskarin høvið til at hevna seg í einum tennisdysti teirra millum

# Talvið hesa vikuna

*Hetta talvið er frá kappingini Amber, sum er ein tvíbýtt kapping við kviktalvi og blindtalvi. Talvið niðanfyri er eitt blindtalv*

Hvítur: Alexander Shirov, Lettland (2751)
Svartur: Jeroen Piket, Holland (2633)

1.e4 e5
2. Rif3 Ric6
3. Bb5 a6
4. Ba4 Rif6
5. O-O Rixe4
6. d4 b5
7. Bb3 d5
8. 2. dxe5 Be6
9. Be3 Be7
10. c3 Ric5
11. Bc2 Rid7
12. Re1 Ridxe5
13. Rixe5 Rixe5
14. Bd4 Ric6
15. Bxg7 Rg8
16. Fh5 Fd6
17. Fh6 O-O-O
18. a4 b4
19. Bxh7 d4
20. Bxg8 Rxg8
21. Rid2 dxc3
22. Rie4 Fd5
23. bxc3 b3
24. Rad1 Fc4
25. Bf6 Bf5
26. Ff4 Bh3
27. g3 Rg4
28. Ff3 Ba3
29. Rid2 Fxa4
30. Rixb3 Rg8
31. Rid4 Bd7
32. Ra1
1-0





# So eigur Áki metið

*Tey seytjan málini, sum Áki Olsen skeyt móti Tjaldri leygardagin, eru tað mesta ein leikari hevur skotið í sama dysti hetta kappingarárið*

Jákup Mørk

Aloftast eru tað teir leikarar, sum skjóta flestu málini, at fólk leggja mest til merkis.

Hetta er allarhelst eisini galdandi í hondbólti, og í so máta fekk Áki Olsen rættuliga gjørt vart við seg, tá hann sunnudagin saman við liðfeløgunum tók ímóti Tjaldri upp á Hálsi.

### Tveir mánaða gamalt met

Tá alt kom til stykkis, hevði Áki skotið ikki færri enn 17 mál, og hetta er tað mesta nakar leikari hevur skotið í einum einstøkum dysti hetta kappingarárið.

Gamla metið fekk John Petersen, tá hann í dystinum millum VÍF og StÍF í Vestmanna hin 30. januar skeyt heili fimtan mál.

Hetta metið fekk John sostatt loyvi at eiga í knappar tveir mánaðir.

Hesi seytjan málini førdu samstundis við sær, at Áki er ovast á máltindinum, nú bert eitt umfar restar av kappingarárinum.

Til stuttleikar kann nevnast, at í sama dysti varð eitt annað met sett, nevnliga hvussu nógv mál næstbesti málskjúttin hjá einum liði hevur skotið í einum dysti.

Heini Joensen var nevnliga eitt sindur smædnari enn Áki, og mátti taka til takkar við 12 málum.

### Rápa hjá kvinnum

Hjá kvinnunum er metið 14 mál í einum dysti, og er hetta komið fyri fýra ferðir í ár.

Ikki heilt óvæntað stendur navnið, Ioana Rápa, á trimum av hesum førunum. Toppskúttin frá undanfarna ári, hevur eisini hetta árið gjørt nógv um seg. og er hon eisini ovast á máltindinum, hóast hon vegna skaðar ikki hevur fingið leikt allar dystirnar.

*Áki Olsen gjørdi eitt ordans hál hetta vikuskiftið og hevur nú lagt seg ovast á máltindin*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

# Máltindurin

## 1. deild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ioana Rápa | VÍF | 163 | (47) |
| Regina Rádó | VB | 154 | (46) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 150 | (60) |
| Vesna Tomajek | Stjørnan | 133 | (54) |
| Sunrid Gleðisheygg | Tjaldur | 97 | (25) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 96 | (7) |
| Inga F. Danberg | Neistin | 93 | (21) |
| Arnleyð Krosslá | VB | 91 | |
| Gurið Mortensen | VB | 88 | (3) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 87 | (25) |
| Simona Hansen | Stjørnan | 86 | (8) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 83 | (2) |
| Jórun Ludvig | Kyndil | 79 | (1) |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 78 | (17) |
| Ann Hansen | Kyndil | 74 | (12) |



*Hóast hon hevði frí hetta vikuskiftið, er Ioana Rápa framvegis ovast á máltindinum hjá kvinnunum*

## 1. deild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| Áki Olsen | Neistin | 181 | (27) |
| Heini Joensen | Neistin | 178 | (35) |
| Sámal Joensen | VÍF | 172 | (34) |
| Artur Johansen | StÍF | 154 | (34) |
| John Petersen | StÍF | 149 | (46) |
| Ingi Olsen | VÍF | 128 | (13) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 128 | (16) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 117 | (24) |
| Petur Martin Johansen | KÍF | 117 | (40) |
| Bjarni Wardum | Kyndil | 116 | (24) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 108 | (7) |
| Vagnur Johannesen | KÍF | 96 | |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 95 | (10) |
| Hans Á. D. Christiansen | Kyndil | 92 | (15) |
| Suni F. Johannesen | Tjaldur | 84 | (20) |

## Bestu málskjúttar í einum dysti hetta kappingarárið

**1. deild kvinnur**

**14 mál:**

| | | |
|---|---|---|
| 07.11.1999 | VÍF-VB | Ioana Rápa |
| 11.12.1999 | Stjørnan-VB | Vesna Tomajek |
| 27.01.2000 | Stjørnan-VÍF | Ioana Rápa |
| 12.02.2000 | Neistin-VÍF | Ioana Rápa |

**13 mál:**

| | | |
|---|---|---|
| 14.11.1999 | Tjaldur-Neistin | Inga Danberg |

**1. deild menn**

**17 mál:**

| | | |
|---|---|---|
| 25.03.2000 | Neistin-Tjaldur | Áki Olsen |

**15. mál:**

| | | |
|---|---|---|
| 30.01.2000 | VÍF-StÍF | John Petersen |

**14 mál:**

| | | |
|---|---|---|
| 10.10.1999 | Neistin-H71 | Heini Joensen |
| 17.10.1999 | H71-StÍF | Artur Johansen |
| 07.11.1999 | Neistin-StÍF | John Petersen |
| 19.01.2000 | Tjaldur-Neistin | Heini Joensen |

## Støðan 1. deild kvinnur

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 9 | 8 | - | 0 | - | 1 | 545 | 426 | 119 | 25 |
| 2 | Neistin | 9 | 7 | - | 0 | - | 2 | 416 | 393 | 23 | 19 |
| 3 | Kyndil | 10 | 5 | - | 1 | - | 4 | 474 | 421 | 53 | 18 |
| 4 | VÍF | 9 | 4 | - | 1 | - | 4 | 463 | 437 | 26 | 16 |
| 5 | VB | 10 | 3 | - | 0 | - | 7 | 511 | 520 | -9 | 10 |
| 6 | Tjaldur | 9 | 0 | - | 0 | - | 9 | 330 | 542 | -212 | 0 |

**Stíf hevur tikið liðið úr kappingini**

## Støðan 1. deild menn

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 11 | 11 | - | 0 | - | 0 | 687 | 567 | 120 | 31 |
| 2 | VÍF | 11 | 9 | - | 0 | - | 2 | 668 | 518 | 150 | 29 |
| 3 | StÍF | 11 | 7 | - | 0 | - | 4 | 661 | 572 | 89 | 25 |
| 4 | Kyndil | 11 | 7 | - | 0 | - | 4 | 656 | 550 | 106 | 21 |
| 5 | KÍF | 12 | 3 | - | 0 | - | 9 | 534 | 687 | -153 | 7 |
| 6 | H71 | 11 | 2 | - | 0 | - | 9 | 537 | 653 | -116 | 6 |
| 7 | Tjaldur | 11 | 0 | - | 0 | - | 11 | 539 | 735 | -196 | 3 |